| | |
|---|---|
| **Heiti á verkætlan**: Selektivur línufiskiskapur | **Ár byrjan og endi**: 1/5 2011 til 31/12 2011 |
| **Skrivað hevur**:<br>Navn: Sigvald Kristiansen, Petur Steingrund og Jákup Reinert<br>Stovnur ella virki: Havstovan<br>t-postur: jakupr@hav.fo | |

**Endamálið við verkætlanini**:

Endamálið við hesi verkætlan var at kanna, í hvønn mun størri húkur er førur fyri at solda tann smæsta toskin og ta smæstu hýsuna frá. Samstundis varð kannað, í hvønn mun toskur og hýsa í ymiskum støddum taka ójavnt ymisk sløg av agni (gágga, makrelur, sild og høgguslokkur).

**Samandráttur av úrslitum**:

Havstovan gjørdi í september og oktober 2011 nakrar línuroyndir eftir toski og hýsu á tveimum leiðum nær landi, ávikavist í Álinum og í Nólsoyarfirði. Endamálið var at kanna, um ymsar húkastøddir fiska ymsar støddir av fiski, um ymisk sløg av agni fiska ymsar støddir av fiski, og um munur er á toski og hýsu hesum viðvíkjandi. Úrslitini av hesi verkætlan eru, at húkastøddin ikki hevur avgerandi leiklut í fiskiskapi eftir stórum toski, men eftir smáum toski eru ávísar ábendingar um, at tann minsti húkurin fiskar best. Royndirnar vísa harumframt, at gágga fiskar meira smáfisk enn hini agnsløgini, og at høgguslokkur fiskar mest stóran tosk. Fyri smáa hýsu hevur húkastøddin stóran týdning, tann minsti húkurin fiskar mest av smáari hýsu. Agnið hevur eisini týdning, og tað er makrelur, ið fiskar mest. Tað var munur á fiskileiðunum fyri bæði tosk og hýsu. Í Álinum var fiskurin meira smáttfallandi enn í Nólsoyarfirði, og munandi meira var av hýsu í Álinum.

| | |
|---|---|
| **Váttan frá verkætlanarleiðara**: | J. Reinert |